## Talentkapping

Dýra Biðjudag verður skipað fyri talentkapping í hondbólti fyri aldursbólkin 12-14 ár bæði gentur og dreingir í Hoyvíkarhøllini. Dreingirnir møta kl 13:00 og byrja kappingina umleið 13:30. Genturnar møta kl 15:00 og byrja kappingina uml kl. 15:30. Talentvenjararnir Guðrun Horn, Hjalmar Klein Olsen, Jónleif Sólsker og Tróndur Kragesteen seta saman fýra gentu- og fýra dreingjalið við talentum úr øllum Føroyum. Dómarafelagið hevur játtað at seta dómarar úr bestu deildunum at døma kappingina. Eisini fara A-landsliðsvenjararnir at fylgja kappingunum.



## Chelsea eftir Kaka og Messi

Hóast fleiri av mongu milliardunum hjá Roman Abramovich longu eru brúktar, so nervar hetta ikki Chelsea í at royna at fáa enn fleiri toppspælarar til felagið. Nú sigur venjarin hjá felagnum, Avraham Grant, at hann fegin vil hava bæði Kaka hjá Milan og Lionel Messi hjá Barcelona til felagið. Enn er einki nevnt um, hvussu nógv Chelsea møguliga skal gjalda fyri spælararnar, men Grant heldur, at talan er um somikið stórt felag, at spælarar altíð vilja siga ja til ein sáttmála.

KÍ-HB:

# Stendur í botni í Klaksvík

**Móti arvafíggindanum fær KÍ onga lætta uppgávu. Men við ongum stigi á kontini er treytaleysa kravið, at spælararnir hesa ferð geva seg í minsta lagi 100%**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað var ein stór strika í rokningini, tá KÍ fyri viku síðani tapti landskappingardyst inni á Skála. Tvey tap á útivølli móti EB/Streymi í lands- og steypakapping vóru sum so til at liva við, men móti Skála vóru trý stig avgjørt við í roknistykkinum í Klaksvík.

Tað eru tey ikki í sama mun, nú HB kemur á vitjan, men avrikið seinast ber heilt víst við sær, at klaksvíkingar nú vilja síggja eitt hart arbeiðandi lið,sum gevur alt í royndunum at vinna sigurin.

Til dystin má KÍ tó vera Rodrigo fyriuttan. Brasilski áleyparin fekk reytt kort í seinastu minuttunum av dystinum á Skála, og er tí leikbannaður.

Hjá HB er møðin frá dystinum móti B36 mikukvøldið kanska ikki heilt runnin sunnudagin. Og tí er ikki óhugsandi, at Rúni Nolsøe fer at gera nýtslu av breiða beinkinum, har menn sum Rasmus Nolsøe og Emil N. Leifsson als ikki vórðu nýttir mikukvøldið, meðan Milan Kuljic kom inn seinastu 25 minuttirnar.

Ivamál eru tó eisini í HB-hópinum. Marcin Dawyd noyddist av vøllinum eftir ógvusliga stempling í seinastu minuttunum av grannauppgerðini mikukvøldið, og tí er hann ivasamur. Røgvi Poulsen hevur verið úti seinastu vikurnar, men hann er møguliga tøkur hesaferð. Tað er Páll Mohr Joensen tó ikki, og enn ganga nakrar vikur, áðrenn hann aftur verður tøkur hjá HB.



*Talan er um stóra klassikaran í føroyskum mansfótbólti. Men í mun til so nógvar aðrar ferðir, so kunnu klaksvíkingar ikki gleða seg til oddabrak sunnudagin*

B71-EB/Streymur:

## Endurtøka á Sandi

**Eftir javnleikin mikukvøldið skulu B71 og EB/Streymur aftur dystast um vikuskiftið. Hesa ferð í landskappingini**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað var kanska eitt hugskot, um teir hjá EB/Streymi bara hildu venjingarlegu á Sandoynni um høgtíðina. Eftir at hava spælt í steypakappingini mikukvøldið, er tað hesa ferð í landskappingini, at teir skulu royna seg.

Hjá B71 er ein munur hesaferð, at Símin Hansen aftur er tøkur, eftir at hann hevur sitið leikbann av sær. Og hartil er spurningurin, um Rasmus Nielsen eisini er komin fyri seg.

Hjá EB/Streymi eru somu spælarar tøkir, sum vóru við í javnleikinum mikukvøldið. Spurningurin her er kanska meira, um gestirnir sunnudagin í størri mun leggja seg eftir øllum trimum stigunum. Í eini hálvfinalu í steypakappingini er javnleikur á útivølli eitt væl brúkiligt úrslit. Men tó at fá lið fáa nakran lættan dyst á Sandi í ár, so er talan alt annað líka um ein dyst av tí slagnum, sum helst skal geva trý stig.



*Fyri aðru ferð innan fýra dagar skal EB/Streymur spæla útidyst móti B71*

B36-Víkingur:

# B36 uttan skiparan

**Við leikbanninum hjá Klæminti Matras má B36 vera tveir av mest týðandi spælarum sínum fyriuttan sunnudagin**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Í B36 kundu tey í gjár fegnast um, at arbeiðs- og uppihaldsloyvið hjá nýggja nigerianska áleyparanum, Patrick Sunday Okoro, er komið í rættlag. Nýggi maðurin kom inn seinastu løtuna av dystinum móti HB, og spurningurin nú er, um hann eisini verður millum teir fyrstu ellivu, tá Víkingur kemur á vitjan í Gundadali.

Og tað er kanska ikki heilt óhugsandi. Við Inga Højsted á skaðalistanum, leikbanni til Klæmint Matras og einum ivasomum Odmar Færø er mest suim allur bulurin á B36-miðvøllinum burtur. Og tí er ikki óhugsandi, at Hanus Thorleifsson verður togaður longur inn á vøllin, og at pláss tí verður fyri nýggja áleyparanum.

Hjá Víkingi er talan ikki um heilt somu trupulleikar. Har er setningurin hjá Anton Skoradal fyrst og fremst, at liðið skal reisa seg eftir tapið móti ÍF fyri viku síðani. Til hetta hevur venjarin allar mans tøkar, og so er spurningurin, um hann hesa ferð fer at blanda sær kortini øðrvísi.